# J. Norðberg: 'Eg bjóði ikki uppá skipini'

Síða 8

tíðinda
sosialurin
blaðið

7,-

Nr. 111 ★ mikudagur 16. juni 1993



# Náttarkoyring kostaði 19 ára gomlum lívið

Síða 12

*Tríggir aðrir í aldrinum 17-24 ár liggja á landsjúrkahúsinum við snuddum teir fingu tá bilur teirra fór útav beint sunnanfyri Skopun týsnáttina*

---

**Thyge Lehman aftaná Jan Mayen - dómin:**

# Haldið fast um miðlinju sum botnmark

Síða 14-15




*– Jan Mayen dómurin sýnir, at eingin sak er eins og at hvør sak verður dømd útfrá tess egnu fortreytum. Tí eiga føroyingar at halda fast við miðlinjukravinum, sigur Thyge Lehmann, danskur samráðingarleiðari, sum seinastu 17 árini hevur samráðst við norðmenn*

## *Thyge Lehman, stjóri í danska uttanríkismálaráðnum:*

# -Standið við kravið um miðlinjumark

*-Tað áhugavera við Jan Mayen-dóminum er tann sannroynd, at tað verður staðfest, at eingin sak er eins og at hvør sak verður dømd út frá tess egnu fortreytum. Sostatt eiga føroyingar - uttan mun til Jan Mayen-dómin - at halda fast um kravið um, at miðlinjan eisini skal vera botnmark.*

*Hetta sigur leiðarin í donsku samráðingarnevndini, sum í skjótt 17 ár hevur samráðst við norðmenn um markið millum Grønland og Jan Mayen, Thyge Lehman.*

*Hann er eisini limur í føroysk-donsku nevndini, sum samráðist við bretar. Thyge Lehman heldur annars, at samráðingarnar við bretar fara at vera drúgvar, tá hugsað verður um, at talan er eisini um allan spurningin viðvíkjandi Rock All og Hatton-platoinum, sum fleiri lond gera krav upp á.*

*-Men føroyingar skulu fáa alla ta hjálp frá løgfrøðingu tænastuni í uttanríkisráðnum sigur hann við Tíðindablaðið Sosialin.*

-Eg eri rímuliga nøgdur við dómin. Hann gav okkum ikki alt tað, ið vit bóðu um. Vit fingu eitt sindur minni enn helvtina av tí øki, sum vit settu fram krav um.

Hetta sigur danski samráðingarleiðarin Thyge Lehman í eini viðmerking til dómin millum Danmark og Noreg um markið millum Grønland og Jan Mayen.

Hann er ikki kløkkur av dóminum, sum hann heldur verða eina millumloysn, ið gongur báðum partum á møti.

Uppá fyrispurning um Danmark og Grønland eiga at vera nøgd við dómin sigur Thyge Lehman, at tað eiga londini at vera og eru tvær orsøkir til hetta.

Lutvíst tí at Grønland nú fær rættin til eitt øki uppá millum 20.000 og 30.000 ferkilometrar og har Noreg seinastu 12 árini hevur fiskað og veitt kóp heilt upp til miðlinjuna. Tað hava grønlendingar ikki verið fegnir um.

Hin orsøkin er tann, at júst hetta økið hevur elvt til nógv stríð og ósemju millum Danmark og Noreg, eitt nú hava føroysk fiskiskip verið upp í. Nú hevur dómstólurin tikið eina endaliga og bindandi avgerð og út frá henni ber nú til at leggja politikkin í økinum til rættis.

Thyge Lehman er sera fegin um, at tær ósemjur, sum hava verið í Norðuratlantshavi orsakað av markinum við Jan Mayen, nú eru at enda komnar og at allir partar kunnu vera nøgdir.

### Norðmenn eisini nøgdir

*-Hava norðmenn orsøk til at vera nøgdir?*

-Ja tað hava teir kanska. Men teir løgdu annars í síni argumentatión sera stóran dent á miðlinjuna, men øll henda argumentatiónin varð víst aftur av dómstólinum. Tað hava teir so ongan orsøk til at vera nøgdir við. Men sjálvt úrslitið kunnu teir tó vera nøgdir við. Linjan, sum er vorðið mark er sett út frá, at hvør parturin



*Thyge Lehman (nr. 2 frá høgru) her á fundi saman við Maritu Petersen, løgmanni og Niels Helveg Petersen, uttanríkisráðharra. Hølgir W. Poulsen, sum var við á fundinum, er limur í føroysk-donsku nevndini, sum samráðist við bretar um markið*

*Danski samráðingarleiðarin í Haag sissar føroyingar:*

## -Eg beri ikki ótta fyri at Jan Mayen-dómur fer at skaða Føroyar

*Tey viðurskifti, sum eru galdandi í sakini um markið millum Føroyar og Bretland eru so ymisk frá teimum millum Grønland og Jan Mayen, at føroyingar eiga ikki at bera ótta fyri eini avgerð í Haag, sum gongur ímóti miðlinjuprincippinum sigur Thyge Lehman, leiðari í donsku nevndini, sum er í Haag fyri at verja donsku sjónarmiðini í sakini um markið millum Grønland*

*Tyge Lehmann stendur við orð síni í Sosialinum í januar í ár, tá hann royndi at sissa føroyingar um ikki at bera ótta fyri, at ein Jan Mayen-dómur, sum gekk ímóti miðlinjuprincippinum fór at skaða føroysku sakina við bretar*




*Nú sita serkønir og nærlesa premissurnar í Jan Mayen-dóminum fyri at vita, um tær kunnu hava týdning fyri ósemjuna millum Føroyar og Bretland. Kortið vísir miðlinjuna og so eina linju, sum eitt skotskt blað heldur vera ta linju bretar seta sum krav fyri mark*

➤

